**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

# Grønur vakstrarpakki í eygsjón



TÍÐARGREININ
*John Johannessen,*
*form., Javnaðarfl. á tingi*

**Fleiri hendur til arbeiðis, betri bjálvaðir bústaðir og almennir bygningar. Hetta eru partar av avleiðingunum av "Grøna Vakstrarpakkanum", sum harumframt hevur við sær minni oljunýtslu og harvið lægri rakstrarkostnað bæði fyri vanliga húsarhaldið og fyri tað almenna. "Grøni Vakstrarpakkin" minkar eisini munandi um føroyska útlátið av CO2**

Pensjónistar og fyritíðarpensjónistar verða tey, ið fyrst merkja ítøkiligu átøkini í Grøna Vakstrarpakkanum. Tað gera tey longu fyrsta dagin, tá ein kunngerð frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður lýst, sum gevur heimild til, at hesi aftur kunnu fáa bjálvingarstuðul.

Hetta merkir í roynd og veru, at pensjónistar nú fáa møguleika at bjálva og nútímansgera hús síni, uttan at tey hava beinleiðis útreiðslur av íløguni. Skipanin við bjálvingarstuðulsláninum er soleiðis háttað, at skuldin verður tinglýst í húsinum og ikki kravd inn, fyrr enn húsið skiftir eigara.

**Orkulán til øll**

Næsta stig verður møguleikin fyri serliga lagaligum orkulánum til øll føroysk sethús. Sum part av Grøna Vakstrarpakkanum fer Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, at leggja uppskot fyri tingið, sum inniber, at Húsalánsgrunnurin skal veita hesi lán, umframt at grunnurin eisini fer at veita fígging til serligar lutaíbúðir, vardar íbúðir og aðrar byggiverkætlanir av slíkum slag.

Politiska ætlanin er at broyta endamálið við Húsalánsgrunninum og Bjálvingarstuðlslánsgrunninum og býta virksemið upp í trý høvuðsøki:

**Bjálvingarstuðul og orkulán til pensjónistar**

Orkulán við lagaligari rentu til øll hús í Føroyum, har endamálið er at minka um oljunýtsluna og CO2 útlátið.

Lagalig lán til lutaíbúðir til fólk við serligum tørvi, vardar íbúðir og aðrar byggiverkætlanir av slíkum slag.

**Pakki við stórum vinningi**

Grøni Vakstrarpakkin er veruliga ein pakki við stórum vinningi. Higartil havi eg bara nevnt ein part av innihaldinum. Men hóast tað, so hava hesi fáu átøk nógvar positivar avleiðingar við sær á fleiri økjum. Pakkin hevur í øllum førum sosialan, grønan og búskaparligan vinning við sær.

**Sosialur vinningur**

Taka vit fyrst tann sosiala vinningin, so ber skjótt til at staðfesta hann soleiðis:

· Pensjónistar sleppa í prinsippinum kostnaðarleyst at bjálva húsini
· Familjur fáa lagalig lán til tað sama
· Hetta sparir tey fyri stórar orkuútreiðslur
· Byrgt verður upp fyri arbeiðsloysi, tí slíkt arbeiði er ógvuliga virksemisskapandi

**Grønur vinningur**

Grøni vinningurin veksur so hvørt eitt hús verður bjálvað. Privatir bústaðir og aðrir bygningar standa fyri 30 prosentum av samlaðu føroysku oljunýtsluni og harvið eisini einum stórum parti av føroyska CO2 útlátinum.

Sambært frálíka álitinum hjá Umhvørvisstovuni "Skjótt syftir seiðir og tað tunga takið", so ber til at minka samlaða føroyska CO2 útlátið við 6 til 8 prosentum, um farið verður miðvíst í gongd við at bjálva og tetta sethús og aðrar bygningar.

Orkulánini eiga møguliga, umframt at veita stuðul til bjálving, eisini at veita stuðul til at skifta út gamlar hitaskipanir. Verður til dømis møguleiki at skifta gamla ketilin út við ein nýggjan, ber sambært Umhvørvisstovuni til at minka samlaða útlátið við 3 prosentum afturat.

Tískil gevur Grøni Vakstrarpakkin okkum møguleikan at koma eitt stórt fet víðari í royndunum at vísa solidaritet við heimin og komandi ættarlið. Vit kunnu við hesum gera okkara til at byrgja upp fyri veðurlagsbroytingunum. Verða áðurnevndu átøk nóg víðfevnd, kunnu tey lækka føroyska útlátið við upp til 11 prosentum.

**Grøni vinningurin er tískil**

· At CO2 útlátið lækkar munandi
· At Grøni Vakstrarpakkin ger mun í veðurlagsátøkunum
· At vit verða minni tengd at oljubúskapinum

**Búskaparligur vinningur**

Búskaparligi vinningurin er eisini stórur av Grøna Vakstrarpakkanum. Hann økir nevniliga munandi um virksemið í landinum, nú vit annars eru í niðurgangstíðum. Tí júst slíkar umvælingar eru mest virksemisskapandi íløgurnar, sum til ber at seta í verk. Tað vil við øðrum orðum siga, at hetta er eitt ógvuliga gott tiltak at byrgja upp fyri einum ov ógvusligum vøkstri í talinum av arbeiðsleysum.

Sambært einum yvirliti, sum Vinnumálaráðið hevur gjørt, fara 65 prosent av íløgukostnaðinum í slíkar verkætlanir beinleiðis út aftur í umfar í samfelagnum. Hetta tí, at lønarparturin av einari íløgu til at umbyggja og umvæla bygningar er heili 65 prosent.

**Yvirlitið frá Vinnumálaráðnum sær soleiðis út:**

· 65% til at umbyggja og umvæla bygningar
· 50% til nýbygging av bygningum
· 35-40% til vegaverkætlanir og helst enn minni til tunnilsætlanir

Og júst hesi tølini stuðla eisini upp undir aðrar partar av Grøna Vakstrarpakkanum. Millum annað puljan á 15 mió., sum er sett av á fíggjarlógini til at bjálva almennar bygningar. Og síðani eisini tilgongdin hjá samgonguni at flyta nakrar av íløgunum í grót og betong yvir á nakrar meira virksemisskapandi íløgur, sum t.d. viðlíkahald og annað.

**Búskaparligi vinningurin er tískil**

· At dygdin av samlaða bústaðarhópinum verður bøtt munandi
· At virksemið í landinum verður økt og harvið verður byrgt upp fyri vaksandi arbeiðsloysi
· At stórur partur av íløguupphæddunum fara í umfar og koma inn aftur í landskassan sum skattur og avgjøld
· At føroyska samfelagið verður minni tengt at oljubúskapinum

**Breið semja um pakkan**

Ábendingar í orðaskiftinum á løgtingi hava longu víst, at tankarnir hjá Javnaðarflokkinum um ein grønan vakstrarpakka hava breiða undirtøku í tingsalinum. Tí er væntandi, at ein stórur partur av átøkunum samgonguni í Grøna Vakstrarpakkanum verða samtykt við stórum meiriluta, har flest allir andstøðutinglimir eisini eru við. Tað er sjálvsagt at gleðast um, tí lítil ivi er um, at hesi átøk veruliga kunnu vera við til at fáa hjólini at mala skjótari aftur í Føroyska samfelagnum.

Tað eru smáar 400 milliónir krónur til taks aftan fyri fyrsta part av "Grøna Vakstrarpakkanum".

